# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK
TLF 341800 FAX 341801

*»Vit vildu ikki lurta eftir Condoleezza Rice«*

*libanski tingformaðurin*

STUTT SAGT

## Giftur fyri fjórðu ferð

Óváttað tíðindi vilja vera við, at tann ráðandi maðurin í Norðurkorea, Kim Jong-il, hevur gift seg við skrivara sínum, sum eitur Kim Ok. Hon hevur verið skrivari hjá Kim Jong-il síðani í áttatiárunum og ber orð fyri at vera ein vitug kvinna. Í januar í ár var hon við, tá Kim Jong-il var í Kina og vitjaði.

Vesturlendskar keldur halda seg vita, at norðurkoreanski leiðarin hevur verið giftur tríggjar ferðir fyrr. Tann seinasta konan, sum æt Ko Young-hee, doyði av krabbameini fyri tveimum árum síðani.

Kim Jong-il eigur tríggjar synir, men vesturlendsku keldurnar vita ikki, um hann eigur nakað barn við teirri nýggju konuni. Hildið verður, at tann elsti sonurin, sum eitur Kim Jong-nam, fer at taka við eftir faðirin, men BBC veit at siga, at hann er ikki serliga høgt í metum, tí hann eina ferð fór eina stuttleikaferð til Japan við følskum passi.

Eitt er í hvussu er vist. Tann, sum skal taka við eftir Kim Jong-il, verður í øllum førum í ætt við hann.

## Leita eftir eftirmanni

Á nýggjárinum skal ST hava nýggjan aðalskrivara, tí tá rennur starvstíðin hjá Kofi Annan út..

Í gjár atkvøddi trygdarráðið um fýra evni til aðalskrivarastarvið, og úrslitið varð, at valdi tvey valevni úr India og Suðurkorea sum tey best egnaðu av teimum fýra. Suðurkoreanski uttanríkisráðharrin, Ban Ki Moon, fekk flestar atkvøður, og indiski ST-diplomaturin Dhashi Tharoor fekk næstflestar. Atkvøðugreiðslan hevði kortini ongan formligan týdning, og tað er ikki óhugsandi, at onnur evni koma upp á tal seinni í ár.

Tær ferðirnar ST hevur valt nýggjan aðalskrivara, hava teir fimm føstu limirnir í trygdarráðmum ofta verið ósamdir. Men tað er neyðugt, at teir semjast, tí nýtir eitt teirra sýtingarrættin ímóti einum valevni, kann hesin ikki veljast.

Kortini tykjast stórveldini vera á einum máli um, at hesaferð skal aðalskrivarin koma úr einum landi í Asia.



*Kofi Annan fer frá á nýggjárinum.*

## Fastir í kava

Áhaldandi kavarok hevur stongt fleiri av teimum týdningarmestu vegunum á markinum millum Argentina og Kili.

Nógvir lastbilar koyra um skørðini og ígjøgnum tunlarnar í Andesfjøllunum, men nú vetur er á sunnaru jarðarhálvu, er ferðslan ofta nógv tarnað av kava. Teir seinastu dagarnar hevur tað kavað sjáldsama illa, og sambært argentinsku myndugleikunum eru umleið 1.300 lastbilar innistongdir í einum tunli undir Christo Redentorskarðinum.

Teir innistongdu bilførararnir hava lítið at gleða seg til, tí veðurmenninir siga frá meiri kava teir næstu dagarnar. Umfrazmt tann nógva kavan er tað eisini ógvuliga kalt og nógvur vindur á marknaleiðunum millum rey bæði londini, skrivar argentinska blaðið El Clarín.

# Vildu ikki lurta eftir Rice



*Í dag hitti Condoleezza Rice ísraelska forsætisráðharran, Ehud Olmert.*

**Libanska stjórnin vísti semings–uppskotinumn hjá amerikanska uttanríkisáðharranum frá sær.**

VÁPNAHVÍLD

*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Einki kom burtur úr fundinum millum libanska tjóðartingsformannin og amerikanska uttanríkisráðharran, tá tey bæði umrøddu møguleikarnar fyri einari vápnahvíld millum Íseal og Hizbollah.

Nabih Berri, tingformaður, segði aftan á fundin, at USA vil hava eina heimsumfatandi semju fyrst, og at partarnir síðani kunnu tingast um vápnahvíld, men ta mannagongdina kann Libanon ikki góðtaka, segði hann.

Ein ónevndur libanskur embætismaður segði, at á fundinum hevði Condoleezza Rice kravt, at Hizbollah skal taka sínar menn norður um Litaniánna, sum er einar 20 kilometrar frá ísraelska markinum. Har–afturat kravdi Rice, at ein altjóða herdeild skal hava eftirlit við markinum, og at øll tey flýddu sleppa heimaftur.

Á fundinum við Rice gjørdu reir libansku samráðingarmenninir greitt, at Ísrael skal lata fangar leysar, so skjótt ein vápnahvíld er fingin í lag, men hesum vísti Condoleezza Rice frá sær.

# Ísraelsmenn flýggja

**Fleiri hundraðtúsund ísraelsmenn eru flýddir úr bygdunum og býunum við libanska markið. Tí er trongligt í býunum sunnanfyri.**

MIÐEYSTUR

*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Í hesum døgum er nógv meiri fólk í Jerusalem og Tel Aviv enn vanligt, tí fólk í hundraðtúrundatali eru flýdd hagar undan Hizbollah-rakettunum har norðuri í landinum. Tey flestu halda til hjá skyldfólki og vinfólki, og tey, sum ikki vita sær annað, noyðast á gistingarhús at búgva.

Ísraelsku myndugleikarnir siga, at umleið ein triðingur av fólkinum har norðuri í landinum eru flýdd. Tey, sum eru eftir, fáa dagliga boð um at fjala seg í teimum serligu trygdarrúmunum.

Hizbollah hevur serliga lagt seg eftir at raka býin Haifa, og álopini hava havt við sær, at í dag er næstan einki fólk at síggja í gøtunum. At kalla allir handlarnir eru stongdir, og tað sama er at siga um matstovurnar. Haifa er ein av teimum stóru ferðavinnubýunum í Ísrael, men nú er lítið at díggja til nakra ferðavinnu har, skrivar Rreuters.

Í øðrum býum har norðuri í Ísrael hava myndugleikarnir gjørt tilbúgvingarskipanir, so fólk fáa at vita, nær tey kunnu fara til handils ella á apotekið.